# SÚRT REGN

Her sært tú fotomynd av standmyndum, nevnar Karyatidurnar, ið vórðu settar upp á Akropolis í Athen fyri meira enn 2500 árum síðani. Standmyndirnar eru úr steinslagi, sum nevnist marmor. Evnið í marmor er kalciumkarbonat.

Í 1980 vóru upprunastandmyndirnar fluttar inn í listasavnið á Akropolis, og eftirlíkningar av teimum vórðu settar upp. Upprunastandmyndirnar vóru um at verða tardar burtur av súrum regni.



## Spurningur 1: SÚRT REGN

*S485Q02 – 0 1 2 9*

Vanligt regn er eitt sindur súrt, tí tað hevur tikið í seg nakað av koldioksidi, sum er í luftini. Súrt regn er súrari enn vanligt regn, tí tað eisini hevur tikið í seg gasssløg sum t.d. svávuloksid og nitrogenoksid.

Hvaðan koma evnini svávuloksid og nitrogenoksid, sum finnast í luftini?

..................................................................................................................................

..................................................................................................................................

Tað árinið, súrt regn hevur á marmor, ber til at vísa við at leggja eina marmorflís í eitt ílat við edikki í eina nátt. Edikkur og súrt regn innihalda umleið somu nøgd av súrni. Tá ið ein marmorflís verður løgd í edikk, koma gassbløðrur. Evnisnøgdin á turru marmorflísini kann verða funnin fyri og eftir royndina

---

**Spurningur 2: SÚRT REGN** *S485Q03*

Ein marmorflís hevur eina evnisnøgd, ið er 2,0 gramm, áðrenn hon verður løgd í edikk í eina nátt. Dagin eftir verður hon tikin úr edikkinum og turkað. Hvat verður evnisnøgdin á tí turkaðu marmorflísini tá?

A Minni enn 2.0 gramm
B Akkurát 2.0 gramm
C Millum 2.0 og 2.4 gramm
D Meira enn 2.4 gramm

---

**Spurningur 3: SÚRT REGN** *S485Q05 – 0 1 2 9*

Næmingarnir, ið gjørdu royndina, løgdu eisini marmorflísar í reint (destillerað) vatn í eina nátt.

Greið frá, hví næmingarnir eisini tóku stig til hetta sum partur av royndini.

...................................................................................................................................

...................................................................................................................................

---

**Spurningur 4: SÚRT REGN** *S485Q10N*

Hvussu stóran áhuga hevur tú fyri upplýsingunum niðanfyri?

*Set bert kross í ein kassa á hvørjari reglu.*

| | | *Stóran áhuga* | *Miðal áhuga* | *Lítlan áhuga* | *Ongan áhuga* |
|---|---|---|---|---|---|
| a) | At fáa at vita, hvat menniskjaligt virksemi økir mest um súra regnið. | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 |
| b) | At læra um tøkni, sum minkar um gassútlát, ið elvir til súrt regn. | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 |
| c) | At skilja mátarnar, ið verðar brúktir at umvæla bygningar, sum hava fingið skaða av súrum regni. | ☐1 | ☐2 | ☐3 | ☐4 |

## Spurningur 5: SÚRT REGN

S485Q10S

Hvussu samd/ur ert tú við útsagnirnar niðanfyri?

*Set bert kross í ein kassa á hvørjari reglu.*

| | | *Sera Samd/ur* | *Samd/ur* | *Ósamd/ur* | *Sera Ósamd/ur* |
|---|---|---|---|---|---|
| a) | Varðveitsla av fornminnum eigur at verða bygd á vísindaligt prógv viðvíkjandi orsøkunum til skaðan. | ☐ 1 | ☐ 2 | ☐ 3 | ☐ 4 |
| b) | Útsagnir um orsakirnar til súrt regn eiga at verða grundaðar á vísindaligar kanningar. | ☐ 1 | ☐ 2 | ☐ 3 | ☐ 4 |